Góðan dagin

Av tí Bjarni K. Petersen, landstýrismaður, hevur latið nýggja lógaruppskotið um fosturtøku víðari til Rættarnevndina, vendi eg mær til tykkara við nøkrum spurningum og reflektiónum, sum eg vóni, at tit vilja taka til eftirtektar í viðgerðini av lógaruppskotinum.

Eg eri sjúkrarøktarfrøðingur og starvist til dagligt innan Heilsuverkið.

Sum eg skilji er lógaruppskotið í stóran mun eitt kopi av donsku lógini. Tó er grein 102 í Sundhedsloven ikki tikin við. Grundin til, at grein 102 einaferð bleiv tikið við í lógina, má vera tí, at man hevur viðurkent, at hetta er eitt trupult evni, og man hevur ynskt at geva øllum heilsustarvsfólki frælsi at virka samvitskufult innanfyri sítt yrki - bæði teimum sum eru fyri og teimum sum eru ímóti fosturtøku. Sum tit øll nokk eru kunnug við stendur:

“Læger, sygeplejersker, jordemødre, sygehjælpere og social- og sundhedsassistenter, for hvem det strider mod deres etiske eller religiøse opfattelse at foretage eller medvirke til svangerskabsafbrydelse eller fosterreduktion, skal efter anmodning fritages herfor. Tilsvarende gælder for personer, der er under uddannelse til et af de nævnte erhverv.”

Sum skilst á bæði Dianu Reynstind, yvirlækna í gynækologi, og Bjarna K. Petersen, landsstýrismanni, er tað av praktiskum orsøkum, at hetta tilvitað er tikið úr.

Hvør praktisk grund er orsøk til hetta?

Er tað tí, at tað gevur teimum, sum skulu planleggja og útinna fosturtøkurnar logistiskar útfordringar, tí talan er um Føroyar, har ein relativt stórur partur av fólkinum - og harvið møguliga eisini starvsfólkunum - er ímóti fosturtøku, og tí verður tað ein útfordring reint praktiskt at útinna og fáa at ganga upp?

Um hetta er tilfeldið, má man innsíggja, at tað ber ikki til bara at kopiera eitt danskt model og trýsta tað niður yvir føroyingar. Um hetta kopieraða uppskotið ikki kann lata seg gera í Føroyum, er tað ikki eitt nóg gott uppskot til føroyingar. Um tað er av praktiskum orsøkum, má man finna praktiskar loysnir, heldur enn at gera inntriv í persónliga frælsið og taka grein 102 úr lógaruppskotinum. So má man afturumaftur, hugsa meira kreativt og hyggja at, hvussu tað so kann lata seg gera. Tí um grein 102 ikki verður tikin við, missa heilsustarvsfólk rættin til at virka samvitskufult innanfyri teirra yrki.

Kann loysnin so vera, at man ger eitt toymi, sum starvast bara við fosturtøkum, og sum man kann velja ella frávelja at søkja arbeiði innanfyri?

Vit gera tað allatíð innan heilsuverkið; eg kann velja ella frávelja at søkja starv innan eldraøkið, eg kann velja ella frávelja at søkja starv á Skurðdeplinum ella á Medisinska

deplinum. Eg kann velja ella frávelja at søkja starv í Palliativa toyminum. Tí skuldi tað ikki verið ómøguligt at tryggja heilsustarvsfólki samvitskufrælsi at velja ella frávelja at viðvirka til fosturtøku.

Ein av grundsúlunum í okkara samfelag, og tað sum vit so ofta reypa okkum av, er persónliga frælsi; talu-, skrivi-og trúðarfrælsi, og frælsi til at liva soleiðis sum okkum lystir.

Tí er tað eisini undrunarsamt at hetta lógaruppskotið, har man tekur persónliga samvitskufrælsi burturúr, kemur frá Bjarna K. Petersen, hvørs politikkur nemliga skuldi bygt uppá persónligt frælsi.

Eg undrist og spyrji; hvar er virðingin fyri teimum, hvørs samvitska ikki kann liva við viðvirkan til fosturtøku? Er persónliga frælsið ikki galdandi fyri tey?

Hetta hevur onki við professionalismu at gera. Man kann gott vera professionellur og samstundis hava eina samvitsku, sum ger viðvirkan til fosturtøku trupla.

Eg havi virðing fyri, at øll ikki hava somu áskoðan sum eg á hetta sárbara evnið sum fosturtøka er. Tí tað eru nógv aspekt sum gera seg galdandi og umstøður eru ikki altíð svart/hvítar.

Og eg virði, at vit liva í einum demokratiskum samfelag, har vit øll hava eina rødd í mun til, hvussu hetta samfelag verður skipað. Men lat tað so eisini vera demokratiskt, tá vit smíða lógir til føroyingar, sum skulu liva við konsekvensinum av lógunum. Lat ikki rættin hjá einum bólki í samfelagnum, sum ynskir fría fosturtøku, ganga útyvir rættin hjá heilsustarvsfólki at handla eftir síni samvitsku í hesum sárbara máli sum fosturtøka er.

Tað sum hetta uppskotið leggur upp til, er eitt drastiskt inntriv í persónliga frælsið, og tá tað kemur til knívskeringar, eigur Føroya fólk at vera vart av lógini heldur enn at blíva tvingað inn í støður, har teirra samvitska stríður ímóti teirra handling.

Vónandi tekur Rættarnevndin hetta til eftirtektar, og vónandi kunnu vit í Føroyum smíða eitt lógaruppskot, sum føroyingar kunnu virka undir samvitskufult.

Vinarliga heilsan
Sólja J. Ceni